


*Kortið vísir nøkur av gassfeltunum vestan fyri Hetland, Laggan Torridon, Laxford og Victory. Pílarnir á kortinum vísa teir báðar brunnarnar, sum verða boraðir hinu megin markið í næstum*

Franska oljufelagið Total:

# Áhugaverd gassboring hinumegin markið

**OLJUFRAMTÍÐ**
*Jan Müller*

Tørvurin á gassi kring heimin og ikki minst her um okkara leiðir hevur fingið oljufeløg at vísa møguligum gassfundum størri áhuga. Seinastu mongu árini eru fleiri gassfund gjørd vestan fyri Hetland tvs. í einum øki, sum ikki liggur so langt frá okkara egna landgrunni. Nøvn sum Laggan, Torridon og Victory finnast á flest øllum oljukortum. Hetta eru gassfund, sum eru gjørd hesi seinastu 25 árini borað hevur verið eftir kolvetni vestan fyri Hetland. Men óvissan um støðd og manglandi tøkni at fara undir framleiðslu av gassi í slíkum øki hevur hildið oljufeløgini aftur at bora nýggjar brunnar.

Men nú tykist vend vera komin í. Risastóra franska oljufelagið, TotalFinaElf fór í mars mánað undir at bora ein avmarkingarbrunn í Lagganfundinum, sum liggur 300 kilometrar norðan fyri stóra Clairfeltið vestan fyri Hetland. Boringin hevur til endamál at vita, um til ber at fara undir at menna feltið ella at brúka tað sum part av menning av fleiri gassfeltum í økinum. Ætlanin er eisini at testa brunnin, sum nú verður boraður. Tað sigur ikki so lítið um trúnna uppá hetta gassfeltið. Higartil eru bara tvey oljufelt komin í framleiðslu vestan fyri Hetland. Hetta er so fyrsta miðvísa royndin at vita, um tað ber til at fara undir at byggja út eitt ella fleiri gassfelt. Í grannalagnum liggur so enn eitt gassfund, Torridon og ikki so langt haðani er enn eitt gass fund, Victory. Spurningurin er um tað ber til at fara undir eina einstaka útbygging ella tengja menning av fleiri gassfeltum saman.

Tað er greitt, at stórur áhugi er fyri Lagganboringini, tí um hon eydnast, kann hon verða startskotið til at menna ein infrastruktur í økinum. Og ein slík byrjan uppá ein infrastruktur til gass kann so aftur vera við til at eggja øðrum oljufeløgum til at bora eftir gassi, bæði kanningar- og avmarkingarbrunnar.

Tað var annars táverandi Texaco, sum gjørdi Victorygassfundið, sum longu tíðliga í 90-unum fór undir at gera eina granskingarætlan fyri gassfundini vestan fyri Hetland, nevnd Aurora. Ætlanin var og er at menna gassfeltini og byggja upp ein infrastruktur, ið skal fáa gassið til høldar og flyta tað til lands.

Annars segði ein av stjórunum í oljufelagnum ChevronTexaco við Sosialin herfyri, at verða positiv úrslit frá boringum eftir gassi vestan fyri Hetland, so kann tað virka sum ein katalysator fyri menning av gassfeltunum í økinum. Onnur oljufeløg, sum hava áhuga í umrøddu gassfeltum eru ConocoPhillips og Agip. Eisini Føroya Kolvetni hevur víst gassfeltum sum Laggan áhuga.



# Føroyska undirgrundin undir sjóneykuna



*Sigurð í Jákupsstovu, føroyskur oljustjóri: -Tøknin, sum í dag verður roynd í grannalagnum kann koma okkum til góða ein dag. Hon kann koma væl við í kjalarvørrinum á eini nýggjari útbjóðing.*

*Mynd Jan Müller*

**Granskarar og serfrøðingar og oljufólk í stórum tali hava leitað sær til Føroya at umrøða føroysku undirgrundina og tær mongu avbjóðingar her liggja. Endamálið er at skapa áhuga fyri at loysa teir spurningar, sum í dag eru ein forðing fyri at finna olju og gass á landgrunninum**

**OLJUFRAMTÍÐ**
*Jan Müller*

Umleið 120 útlendskir og føroyskir granskarar og serfrøðingar á oljuøkinum fara í dag og mikudagin at seta hvørjum øðrum stevnu í Norðurlandahúsinum. Talan er um eina ta størstu fakligu ráðstevnu, sum nakrantíð hevur verið fyriskipað í Føroyum. "Faroe Islands Exploration Conference" skal vera við til at seta fokus á føroyska landgrunnin sum eitt spennandi og áhugavert leitiøki fyri altjóða oljufeløg í framtíðini eisini.

Endamálið við ráðstevnuni, sum Jarðfrøðissavnið og Oljufyristingin stíla fyri, er at savna fakfólk at tosa um jarðfrøðina á føroyska landgrunninum, olljuleiting undir basaltinum og møguleikarnar og avbjóðingar annars viðvíkjandi oljuleiting í Føroyum í framtíðini.

Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfrøðissavninum og Oljufyrisitingini er sera fegin um stóru undirtøkuna, sum ráðstevnan fær. Hon er so eisini ein stór avbjóðing fyri føroyingar, sum arbeiða við jarðfrøði og oljuspurningum. Føroyingar skulu hava tríggjar framløgur á ráðstevnuni og viðgongur Sigurð í Jákupsstovu, at hetta er ein positiv avbjóðing. Nógv orka fer til at fyrireika hetta. So ein kann siga, at ráðstevnan líkasum skuggar eitt sindur fyri sjálvari 2. útbjóðing, sum kortini liggur í tryggum hondum í Vinnunevndini til viðgerð.

Hóast talan er um eina fakliga ráðstevnu, so ivast Sigurð í Jákupsstovu ikki í, at okkurt spennandi fer helst at spyrjast burtur úr. Talan er jú um fleiri av heimsins fremstu serfrøðingum í basaltspurningum og innan jarðfrøði sum heild. Granskararnir og serfrøðingarnir, teir flestu jarðfrøðingar og jarðalisfrøðingar og við hollari vitan til undirgrundarmál og harvið eisini til framtíðar oljuleiting, koma úr Bretlandi, Noregi og Danmark og øðrum londum við. Teir umboða oljufeløg, lærdar háskúlar, granskingarstovnar og myndugleikar. Hóast basaltspurningurin er ein av spurningunum, sum verður viðgjørdur, so er tað kortini alt Føroyaøkið sum heild, sum fer at vera undir sjóneyku. Her ikki minst spurningurin um, hvat er undir basaltinum.

Tað er so heldur eingin loyna, at okkara oljumyndugleikar brúka hesa ráðstevnuna sum eina roynd at fáa fokus á Føroyaøkið eisini við eini 2. útbjóðing fyri eygað. Sigurð í Jákupsstovu sigur, at tað er ikki óvist, at oljufeløg og teirra granskarar vilja finna svar og kunna brúka svar frá Føroyaøkinum í øðrum økjum kring heimin eisini. Tvs. at henda ráðstevnan ikki bert fer at snúgva seg um avbjóðingar á okkara øki men avbjóðingar, sum líknandi jarðfrøði hevur nógva aðrataðni við. So royndirnar, sum kunnu gerast her, kunnu eisini brúkast aðrastaðni, har tað finnast trupul øki í sambandi við oljuleiting. So tað er ikki óhugsandi, at føroyskir landgrunnurin og Føroyar kunnu gerast ein framtíðar royndarstøð fyri gransking í sambandi við basalt og serstøku jarðfrøðina her.

## Framkomna tøknin kann koma okkum til góða

**Tað er sera áhugavert at síggja, hvussu framkomna tóknin í eitt nú Norðurnorra hevur gjørt, at tú sleppur undan at byggja út felt við stórum pallum til havs. Hetta er nakað, sum kann koma okkum til góða ein dag, tá og um vit finna gass og skulu taka tað upp sigur Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyrisitingini**

**OLJUFRAMTÍÐ**
*Jan Müller*

Millum føroyingarnar, sum vóru við í ferðalagnum, ið vitjaði í Noregi herfyri í sambandi við avtalu hjá Atlantsflog, var eisini nýggi stjórin á Oljufyrisitingini, Sigurð í Jákupsstovu. Vit spurdu hann hvønn íblástur ferðin gav honum. Hann sigur, at hetta var ein sera áhugaverd ferð, sum hevur givið honum nógv at hugsa um. – Tað, sum eg haldi vera serstakliga spennandi og áhugavert fyri okkum í Føroyum, var at síggja, at tað ber til at útbyggja eitt felt, sum liggur so langt úti til havs á tann hátt, sum tað verður gjørt. Tað haldi eg hevur perspektiv fyri okkum. Men um tað ber til at flyta ta tøknina til okkara øki eisini, tað er so ein annar spurningur.

Sigurð í Jákupsstovu heldur tað vera sera áhugavert at síggja, at tað ber til at byggja eitt felt út uttan at skula byggja ein stóran pall úti havinu. So tann tøknin, sum nú verður ment í Barentshavinum og fyri tað eisini aðrastaðni við, eitt nú í Norðsjónum, hon kann ein dag koma okkum til góðar.

Feltið, sum føroyski oljustjórin sipar til, er fyrst og fremt Snøhvitgassfeltið út fyri Norðurnoreg. Feltið, sum varð funnið fyri meira enn 20 árum síðani, er risastórt, og nústaðni í dag er tøknin so nógv ment, at norðmenn hava gjørt av at útbyggja tað fyri 45 milliardir krónur. Gassið verður flutt í rørleiðingum á havbotninum til oynna Melkøya, sum liggur beint út fyri Hammerfest í Norðurnoregi. Øll øyggin sum hon er verður í løtuni umgjørd til eitt risastórt gassverk, har gassið verður umgjørt og síðani flutt við risastórum tangaskipum inn á amerikanska meginlandið. Tað var í hesum sambandi, at Atlantsflog herfyri gjørdi avtalu við eitt norskt felag um at flyta oljuarbeiðarar úr Suðurnoregi til Norðurnoregs at arbeiða við Snøhvitverkætlanini.

Sum Sigurð í Jákupsstovu vísir á, so kann øll henda nýggja tøknin ein dag koma Føroyum til góðar. Ímynda vit okkum, at tað t.d. verður gjørt eitt ella fleiri risastór gassfund við Føroyar, so er ikki óhugsandi, at vit eisini kunnu brúka ta tøknina, sum verður útviklað eitt nú í Noregi.

Sigurð í Jákupsstovu sigur, at tað kann eisini gerast sera áhugavert, um vit gera stór gassfund á landgrunninum. –Nú vita vit av góðum grundum ikki, hvat er undir basaltinum, men har hómast stórir strukturar, sum eisini kunnu goyma gass. Og í tí førinum vil tað vera áhugavert at kunna brúka nýggjastu tøknina, sum finst, skulu vit taka gassið upp.

Í sambandi við at franska oljufelagið Total í løtuni er í ferð við at bora ein avmarkingarbrunn vestan fyri Hetland kring Laggan gassfeltið, heldur Sigurð í Jákupsstsovu eisini, at eitt positivt úrslit av hesi ella aðrari boring kann fáa týdning fyri framtíðar menning av kolnvetnisframleiðslu hjá okkum, tí verður eitt felt sum Laggan bygt út, so merkir tað jú, at vit fáa gongd á ein infrastruktur í økinum. Tað kann gera tað lættari hjá okkum at flyta møguligt føroyskt gass til meginlandið.